inni - trygt og ómaksleyst til hús www.inni.fo



# Nýggj hús við panorama-útsýni í Sørvági.













## Tú sært tað við tað sama. Húsini eru nakað fyri seg. Liggja sera væl fyri ovarliga í Sørvági so útsýnið er einastandandi.

**Tú kemur til bygdina**
Tú koyrir gjøgnum bygdina og niðan til Traðaveg , har standa tey so hábærslig og við eitt sindur øðrvísi sniðgeving – spennandi. Her eru eini hús, ið hóska til landslagið og umhvørvið, eins og tey eru til bæði ungu familjuna og til tey, ið eru vorðin eitt sindur eldri og vilja hava eini praktisk hús. Tú kanst eisini velja at trýsta á knøttin til garaguportrið og koyra bilin beinleiðis inn í sera snøggu garaguna, so tú ikki verður vát/ur í illsliga veðrinum.

**Stílur og snið**
Fert tú inn ígjøgnum høvuðsdyrnar, møtir tú einum sniði, ið er fjálgt og hugnaligt og einum stíli, ið er reinur og strammur. Húsini hava ikki bara eitt gott signalvirði, men eru eisini sera góð at búgva í. Tú kennir teg heima alt fyri eitt. Tey eru nýmótans inrættaði og alt er sum tað eigur at vera. Eisini eru tey væl bjálvaði, so at tú merkir tað skjótt á oljurokningini.

**Ljós og luft**
Fert tú innar í køkin / alrúmið/stovuna, fært tú nógva ljósið inn í alt rúmið. Tú setir teg fyri vindeyga við einum koppi í hondini, men útsýnið er bara so avbera gott, at tú gloymir at drekka og kaffi verður kalt. Klárt er at gera eina terassu út frá stovuni. Vindeyguni í stovuni eru nakað lægri, so tú kanst sita í møblunum og hóast alt síggja út, men uttan at onnur síggja inn.

**Enn meira pláss**
Nú fara vit út aftur í gongina og longur inn í húsini. Her finnur tú eitt rættiliga stórt hjúnarrúm við klædnarúmið og egnum baðirúmið og næst tí er eitt fitt kamar. So fara vit inn aftur í stovuna og niður gjøgnum trappurnar, tú kemur niður í ein stóran kjallara, har eru 2 kømur og ein stór "hall". Umframt hetta er eisini eitt stórt kjallararúm, so møðuleikarnir eru nógvir.

## Fakta:
Nýggju, sera snøggu og væl bygdu húsini eru í 2 hæddum hvør á 122 m2 – í alt 244 m2 – alt sera snøgt innrættað. Grundøkið er 763 m2. Byggiár: 2004. Í neðra er inngongd, durur / gongd / hall, stórt kamar, minni kamar, baðirúm við kar og brús, fýrrúm, stórt kjallararúm og garaga við sjálvvirkandi portri. Í erva er trappugongd, grovkøkur / vaskirúm við egnari inngongd, køkur / alrúm / borðsstova / stova, hugnastova / sjónvarpsstova, kamar, hjúnarrúm við baðirúmi og klædnarúmi. Húsini standa í veðurgóðum, náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg nær við skúla og dagstovn. Húsini hava sera vakurt panoramaútsýni yvir Sørvágsfjørð.
**Prísuppskot: 1.900.000**



inni

P/F Inni | Niels Finsens Gøta 37 | P.O. Boks 364 | FO-110 Tórshavn | inni@inni.fo | Tlf. 320 410 | Fax 320 510